# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Einki samband millum tørv og játtan

Ein leiðandi embætismaður á Landssjúkrahúsinum, hevur á óvanligan hátt gjørt vart við trupulleikar á Landssjúkrahúsinum. Hann hevur við brævi vent sær beinleiðis til lóggávuvaldið. Stigið er óvanligt, tí tað er óvanligt, at millumleiðarar venda sær beinleiðis til Føroya Løgting. Hinvegin má ásannast, at tey viðurskifti, sum gjørt verður vart við, eru opinbart so út av lagi, at vit eiga at vera manninum takksom fyri tað dirvið og ábyrgdarkensluna, hann her hevur víst. Viðkomandi leiðari ger vart við, at als einki samband er millum veruligan tørv og játtan til rakstur og viðlíkahald av bygningum og øllum, sum hevur við bygningar at gera, eitt nú tunnil og kloakkir.

Hetta er veruliga so álvarsamt mál, at landsstýrissamgongan kann ikki lata hetta fara aftur við borðinum. Viðkomandi leiðari minnir á, at landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, áður hevur meldað út, at tað eigur at kannast, hvat tað eigur at kosta at reka eitt landssjúkrahús við teimum veitingum, sum vera veittar í dag og so taka støðu til, um løgtingið vil játta fígging til tað tænastustøði, sum er í dag ella at minka um tað. Hetta er kjarnin í einum máli sum hesum. Vilja vit hava eitt nútímans landssjúkrahús fyri allar Føroyar, so mugu vit rinda tað, ið hetta kostar ella fara aðrar vegir. Eingin ivi er um, at flestallir føroyingar ynskja, at vit varðveita Landssjúkrahúsið sum meginsjúkarhús, og tí skuldi avgerðin ikki verið trupul.

Viðkomandi leiðari mælir til, at játtanin til rakstur av bygningum o.ø. verður skipað á sama hátt sum játtanin til medicotekniska útgerð, sum er ein serskild játtan. Hon eigur at greinast sundur í fýra partar, sum tilsamans árliga fara at kosta 24 milliónur kr. og er hetta ein vøkstur uppá 12,3 mill. kr. Tað almenna hevur júst bygt nýggjan bygning og sett stórt umvælingararbeiði í gongd í gomlu bygningunum. Hesar íløgur verða ikki tryggjaðar nóg væl, um ikki bygningar og útgerð verða hildin væl og virðiliga. Tað skuldi verið óneyðugt at gjørt vart við, at niðurslitnir bygningar og slitnar installatiónir eisini ganga út yvir viðgerðar- og sjúklingatrygd. Samstundis kann staðfestast, at stór almenn virði fara fyri skeytið, um dýrir almennir bygningar og verkløg ikki verða hildin í forsvarligum standi. Her er sostatt eingin leið uttanum. Landsstýrið má ásanna tørvin og útvega Landssjúkrahúsinum eina árliga játtan samsvarandi tørvin til rakstur og viðlíkahald av bygningum, útgerð og installatiónum, so stovnurin kann virka optimalt til gangs fyri allar føroyingar.

**Sosialurin**

## Er kunningarráðgeving ólóglig?



NIELS UNI DAM, CAND. COMM

Fyrrverandi kunningarráðgevi hjá Tórshavnar kommunu

**Dimmalætting hevði í farnu viku sett sjóneykuna á kunningarráðgevingina hjá Tórshavnar kommunu. Greinin var merkt av manglandi virðing fyri kunningarráðgeving, og hevði eina rættiliga óhepna villu**

Fyrst til villuna, greinskrivarin endar greinina við at skriva soleiðis:

"...hvørgin av teimum báðum undanfarnu borgarstjórunum í Tórshavnar Kommunu, Jan Christiansen og Leivur Hansen, halda seg nakrantíð hava brúkt fjølmiðlaráðgeving frá sjálvstøðugum ráðgevum til at skriva røður, lesarabrøv og tíðindaskriv fyri seg, meðan teir vóru borgarstjórar, hóast kommunan tá ikki hevði nakað kunningarfólk í starvi."

Hetta seinasta er ósatt. Eg var settur í starv sum kunningarfólk undir Jan Christiansen, og havi seinni eisini virkað sum kunningarfólk undir Heðini Mortensen. So Jan hevði kunningarfólk í starvi.

Tað er sera stuttligt at hava arbeitt fyri tveir so ymiskar borgarstjórar, ið hava so ymiskan hátt at síggja kunning og týdningin av kunning fyri bæði borgarstjóra, umsiting og borgarar. Eg skal ikki siga nakað um, hvat er rætti holdningurin, ella hvør av teimum báðum Jan ella Heðin er betur egnaður sum borgarstjóri, tað má veljararin sjálvur taka støðu til. Báðir eru so sera fittir menn og arbeiðsgevarar, ið eg enn havi jaligar tankar um.

**Manglandi virðing fyri kunning**

Eg havi ikki innlit í hvørt einstakt lesarabræv ella røðu, sum hesar 43.000 krónurnar handla um, so eg veit ikki, um Heðin hevur gjørt nakað galið. Men eg verið ikki klókari hesum viðvíkjandi av greinini í Dimmalætting 10. apríl. Við at kriminalisera uttanhýsiskunningarráðgeving sum heild, sleppur greinskrivarin sær undan próvbyrðuni. Hetta vísir eina manglandi virðing fyri fakinum kunning.

Kommunan hevur nokk einar 15-20 byggifrøðingar, verkfrøðingar og arkitektar í starvi. Men hóast hetta keypir kommunan dagliga hjálp uttanifrá bæði frá arkitektum og verkfrøðingum. Eingin sigur eitt øvugt orð um hetta. Eg havi t. d. ongantíð hoyrt, Dimmu, útvarpið ella nakran annan spurt, hví MAP arkitektar ella onkur annar teknaði tann ella tann bygningin, hóast kommuna hevur fleiri arkitektar í starvi.

Eg havi ongantíð hoyrt nakran miðil spurt, hvat býararkitekturin ella onkur av hansara monnum gjørdu, meðan onkur ávísur bygningur bleiv teknaður av arkitektum uttanhýsis. Heldur ikki havi eg upplivað, at fólk spekuleraðu, um hetta var orsakað av manglandi áliti á býararkitektin. Eftir júst somu prinsippum er einki galið at síggja í, at borgarstjórin keypir sær uttanhýsis kunningarráðgeving, ella fær lesarabrøv og røður skrivaðar uttanhýsis. Heldur ikki hóast hann hevur ein kunningarráðgeva í starvi (mær vitandi vóru tveir í starvi, tá hetta fór fram).

**Kunning hevur týdning**

19.000 kr av teimum 43.000 snúðu seg um ráðgeving í sambandi við trupulleikarnar í gamla Realskúlaum Eg kann garantera tykkum, at hetta mál hevur kostað kommununi milliónir, og eg haldi tað vera sera skilagott, at borgarstjórin fekk sær professionella ráðgeving, um hvussu hann skuldi takla kunningina í sambandi við hetta (í Dimmalætting) nógv umrødda mál. At summir býráðslimir fyri egnan politiskan vinning finnast at Heðini, tað er í ordan, men pressan átti at farið meira seriøst til verka.

## Havnar kommuna neyðtekur náttúruna

KRISTJAN GEYTI JOHANSEN

Signabøur

Viðmerking til Vikublaðið 1. apríl um bingjuhavn fram við allari fjøruni á Signabø, sum skal ljóða sum skemt ella 1. APRÍL.

Nei hjá Havnar kommunu er tað í veruleikanum als ikki skemt ella 1. apríl. Tvørturímóti, tað er nevniliga planurin at voldtaka alla náttúruna inni á Oyrareingjum og úti á Signabø. Soleiðis gera tað ómøguligt hjá ungum familjum at seta búgv har, sum annars fleiri hundrað sethús kundu verið bygd, um hugsað var um bygdamenning og trivna.

Sum er vilja fólk heldur seta búgv í Sunda kommunu, tí um tey skulu fáa grundstykki í Havn, skulu tey bíða eitt mannaminni og oman á tað heila, keypa sær fjallaklintraraútgerð, fyri yvirhøvur at koma til grundstykkið, tí húsini verða jú bygd uppi í rókunum, har sum fuglurin annars heldur til. HVAR ER FRIÐINGARNEVNDIN í hesum tíðum, tá nakað veruligt er vert at friða. Ella hvar er landsstýrismaðurin í øllum hesum skilaleysa framferðarhátti hjá kommununi? Sjálvandi KRAGE SØGER MAGE.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.